# loymt tendringina




*HB-miðvøllurin fekk ongantíð motorin í gongd av álvara, og tað gerst ikki uttan revsing, tá Skála er mótstøðuliðið*

Tór-Ingar Akselsen. Hann fekk lítlan og ongan stuðul, men hann megnaði framúr væl sjálvur at skapa sær møguleikar. Fleiri ferðir kendu mótstøðumenninir seg noyddar at taka beinini undan honum, og tað var eftir sovorna støðu, at Rasmus Nolsøe á hálva tímanum úr tjúgu metrum sendi upp um manngarðin og í kassan.

Skála helt fram at trýsta, og eftir tvær deyðbóltsstøður fingu teir eftir lítlari løtu tvey mál afturat. Í fyrra førinum legði Iulian Florescu innfyri úr vinstru, og Rúni Nolsøe var so óheppin at stýra bóltinum í egið mál, og í seinna førinum misti málverjin bóltin út til Milic Curcic eftir langa frísparksframlegging.

### Tóku hvassasta vápnið burturúr

Í 2. hálvleiki var væl minni vindur, enn tað hevði verið. HB royndi at leggja trýst á, og tað myndaðist skjótt soleiðis, at álopsspælararnir hjá Skála arbeiddu nógv í verjupartinum samstundis sum skálamenn støðugt hóttu við at fara í kontra við fleiri monnum. Tá ið umfarið var átta minuttir gamalt, skifti HB báðar álopsspælararnar út. Harvið slapp Skála undan Tór-Ingar Akselsen, sum hevði verið støðug hóttan.

Heine Fernandez setti seg sjálvan á vøllin. Hann flutti seg ikki nógv, men hann megnaði væl við rygginum móti mótstøðumálinum við beinum, høvdi og bringu at temja til liðfelagarnar, sum royndu við langskotum, uttan at tey vóru serliga neyv.

Skála hevði møguleikar at økja um leiðsluna, men HB fekk um endan, tá ið Rasmus Nolsøe úr 35 metrum sendi fríspark upp um manngarðin og umvegis tvørtræið og í kassan. Tá fóru teir at vísa viljan, sum skuldi til. Men 2. umfarið var undirstriking av tí, sum hevði verið at sæð undan steðginum, og tað var, at HB liðið ikki var í javnvág. Jákup á Borg hevur royndirnar og førleikan til væl størri leiklut enn at vera verjukendur vongverji, og tað er serliga sjónskt, tá ið hvørgin síðuspælarin á miðvøllinum megnaði at røkka til baklinjuna og leggja innfyri.

Kortini boðar tað eisini frá formati, at tað í sovornari støðu eydnast næstan at koma afturíaftur. Síðstu løtuna vóru Jákup á Borg og Rasmus Nolsøe ofta í Skála brotsteiginum, og sera arbeiðssami Pætur Dam Jacobsen var eyka miðverji hjá heimaliðnum. Hann og liðfelagarnir drógu longra stráðið. Tað varð staðfest, tá ið Jónhard Frederiksberg í skjótum álopi framvið næstan manntómu HB verjuni skoraði til 4-2.

## Fakta um dystin

**Skála-HB 4-3 (3-1)**

1-0: Rúni Rasmussen 12.
1-1: Rasmus Nolsøe 29.
2-1: sjálvmál Rúni Nolsøe 33.
3-1: Milic Curcic 35.
3-2: Rasmus Nolsøe 68.
4-2: Jónhard Frederiksberg 88.
4-3: Rasmus Nolsøe 90.

Dómari: Lassin Isaksen

Skála: Vlada Filipovic - Bárður Danielsen, Rúni Rasmussen, Milic Curcic, Iulian Florescu (Rói Jacobsen, 65.) - Pætur Dam Jacobsen, Pauli G. Hansen, Nenad Stankovic (Sveinur Justinussen, 90.), Hanus Thorleifsson - Jónhard Frederiksberg, Bogi Gregersen

Gult kort: Pætur Dam Jacobsen, Iulian Florescu, Nenad Stankovic

HB: Bárður Johannesen - Jákup á Borg, Jóhannis Joensen, Rasmus Nolsøe, Janus M. Joensen - Rókur Jespersen (John Heri Dam, 77.), Rúni Nolsøe, Kári Nielsen, Hallur Danielsen - Hans á Lag (Hendrik Rubeksen, 54.), Tór-Ingar Akselsen (Heine Fernandez, 54.)

Gult kort: Bárður Johannesen, Rúni Nolsøe

## Manngarðarnir eru ov stórir



*Rasmus Nolsøe skoraði fyri fyrstu ferð í bestu mansdeildini í fótbólti. At talan so eisini gjørdist um hat-trick mundi gjørt dagtin perfektan, men har vantaðu stigini*

**Trífaldi HB málskjúttin hevði ongantíð áður skorað í landskappingini. Hann ásannar, at HB spælið ikki var nóg gott, og at tað vóru deyðbóltsstøðurnar, sum vóru avgerandi**

HB
*Jóannes Hansen*

Dagsins HB spælari var miðverjin Rasmus Nolsøe. Kanska vóru tað ikki verjudygdirnar, sum vóru serliga eyðsýndar hjá honum. Heldur vóru tað óføru skotini. Rasmus skoraði øll trý HB málini, og sjálvur sigur hann, at tað var um reppið, at hann javnaði til 3-3.

- Vit høvdu horna, og bólturin kom til handara stólpan, har eg ætlaði at seta hann í málið, men tíverri fór hann undir fótinum, og so fingu teir hann út aftur til horna, sigur Rasmus Nolsøe, ið ikki hugsar um at sleppa longri fram á vøllin at spæla.

- Eg trívist best sum miðverji.

Er tað langt síðani, at tú hevur skorað trý mál í sama dysti?

- Um tú hugsar um í bestu deildini, so er tað faktiskt soleiðis, at eg havi ongantíð áður skorað í landskappingardysti í 1. deild.

Heldur tú, at manngarðarnir eru rættir, tá ið teir royna at byrgja fyri fríspørkum?

- Eg haldi, at teir ofta eru ov stórir, og at tað harvið verður óneyðuga torført hjá málverjanum. Tá ið eg javnaði til 1-1, lyfti eg bara bóltin upp um manngarðin. Eingin serlig ferð var í sparkinum, men bólturin fór í netið, tí málverjin var ov langt í hinum borðinum. Hann roknaði við, at manngarðurin fór at verja hina síðuna av málinum, og so var hann prísgivin.

Hvat heldur tú er besti manngarðurin?

- Har tað ikki eru fleiri enn tríggir spælarar, og har málverjin stillar seg eitt sindur meiri mitt í málið.

Heldur tú, at málverjin átti at havt tikið seinna frísparksmálið hjá tær?

- Lotið var undan, og tí bar til at fáa nógva ferð á bóltin. Um eingin manngarður hevði havt verið, so hevði málverjin í havt betri møguleika at fylgt bóltinum.

Hvat heldur tú um tykkara avrik?

- Tað var ikki nóg gott. Skála eigur eitt gott lið. Teir arbeiða nógv, og teir eru góðir fótbóltsspælarar. Tí krevst tað nógv av okkum móti sovornum liði, og vit megnaðu ikki nóg nógv. Vit arbeiddu ikki nóg nógv, og spælið hekk ikki nóg væl saman. Legg til merkis, at tað eru deyðbóltsstøðurnar, sum vóru avgerandi og ikki so nógv gjøgnumspæld álop, ið bóru mál við sær, staðfestir Rasmus Nolsøe.